# Tú kanst rokna við pengum

**MATEMATIKK.** Sjey stórar støddfrøðisligar gátur eru eftir at loysa, og nú eru 57 milliónir krónur at vinna, um tú kanst loysa hesar gátur

Dugir tú meira enn at loysa eina uppgávu í multiplikatión, so ert tú kanska tann persónurin, sum heimurin hevur brúk fyri.

Sjey stórar støddfrøðisligar gátur eru eftir at loysa, og amerikanska Clay Mathematics Institut setir nú 57 milliónir krónur upp á spæl fyri at fáa loyst hesar gátur. Hetta skrivar danska blaðið, Berlingske Tidende.

Í 150 ár hava fremstu serfrøðingarnir í heiminum roynt at loysa hesi matematisku ivamál, men tað hevur ikki eydnast. Um tað eydnaðist, hevði tað havt við sær stór framstig innan flogferðslu og loyniskriftir.

Millum tær sjey gáturnar er tann sokallaða »Riemann-hypotesan« frá 1859 tann mest umrødda, og fyri at loysa hesa hypotesu er ikki bert ein virðisløn upp á 8,2 milliónir krónur.

– Hetta eru tær sjey størstu og kendastu gáturnar innan støddfrøðina, og hetta kemst sjálvandi av, at tær ikki kunnu loysast, og tí so nógvir serfrøðingar hava roynt at loysa tær. Um tað nú skuldi eydnast onkrum at gjørt enda á hesum gátum, hevur hann verðið heimskendur, sigur Mogens Esrom Larsen, sum er lektor við universitetið í Keypmannahavn, við Berlingske Tidende.

Seinastu 100 árini eru tað bert tvey avrik innan støddfrøðina, sum kunnu sammetast við tær sjey gáturnar. Í 1994 loysi bretin, Andrew Wyles, Fermat-trupulleikan, og í 1934 prógvaði eysturríkarin Kurt Gødels, at logikkurin ikki rakk til.

Hvat øll hesi hugtøk merkja og innibera, skulu størri heilar til at greiða frá, men at talan er um eina jagstran eftir pengum og virðing, kann eingin vera í iva um.

So royn teg!



# Olsen-brøðurnir á toppinum

**TÓNLEIKUR.** Donsku Olsen-brøðurnir eru flúgvandi á kærleikans veingjum í løtuni. Sangurin, sum teir vunnu altjóða Grand Prixið við, er at finna á toppinum á hitlistum í Norðurlondum.

»Fly on the Wings of Love« er nummar eitt í Danmark, Noregi og Svøríki. Í hesi vikuni koma hesi sangur beinleiðis inn sum nummar 1 á almenna norska hittlistanum, og hetta er fyrstu ferð, at ein vinnandi sangur frá Grand Prixnum hevur klárað hetta.

Olsen-brøðurnir eru eisini á toppinum á hitlistanum hjá Danmarks Radio, og í Svøríki eru teir eisini ovast á stakfløgulistanum.

Í Føroyum hevur sangurin eisini verið nógv at hoyra, og seinasta leygarkvøld var »Fly on the Wings of Love« nummar 3 á 15 teimum bestu. Hann kom beinleiðis inn sum nummar 3, og í kvøld skal hann kappast við hinar oddafiskarnar hitlistanum hjá ÚF.

# Hermenn á skeivari leið

Herfyri fóru italskar elituherdeildir skeivar av Noreg og Svøríki undir Nato venjing. Orsøkin vóri býirnir Kristiansand og Kristianstad. Tað tykist ikki, sum hevur nakar í herdeildini hugsað um, at Svøríki er ikki limur í Nato

*Dagfinn Olsen*

Hóast tað skuldi verið gjørligt at sæð mun á Kristiansand og Kristianstad, so kann tað eftir øllum at døma vera trupult.

Í Kristiansand í Noreg bíðaðu tey herfyri spent eftir 116 elituhermonnum frá italsku Alpini-deildini. Í Kristianstad í Svøríki vórðu tey rættiliga tikin á bóli, tá deildin kom á flogvøllin har.

Teir 116 hermenninir skuldu verið við í eini Nato venjning í Noreg, veit Ekstrablaðið at siga frá italsku avísini Corriere del Sera.

Men tað gjørdist sviar, ið vórðu tiknir á bóli av italiumonnunum. Italska avísin skrivar um svensku tollararnar, ið, ið hugdu við, tá hermenninir komu úr flogfarinum, útgjørdir við tungari útgerð og fjøðurprýddu húgvunum.

Tað tykist ikki, sum hevur nakar í herdeildini hugsað um, at Svøríki er ikki limur í Nato.

Italska avísin ber ikki í bøtuflaka fyri herdeildini, hóast nøvnini á býunum líkjast.

Hendingin er láturverd og sera keðilig fyri Italiu, sum roynur at koma sær burturúr myndini av italsku verjuni sum láturligari og ónýtiligari.

Italska verjumálaráðið greiðir frá, at herdeildin fleyg við leiguflogfari, leigað til endamálið.

Talsmaður fyri flogfelagið sigur, at í Noreg er eisini eitt Kristiansund, so ikki er at undrast á, at flogskiparin ivaðist.

Úr Oslo fréttist, at italsku hermenninir eru komnir fram til Nato venjingina, sum sum ætlað.



**Hermenn úr Italsku Alpini deildini fóru skeivir av Noreg og Svøríki. Hendingin er keðilig fyri Italia, sum roynir at koma sær burturúr, at verjan verður mett sum ónýtulig og látulig (Tilvildarlig mynd)**

**Tíðindablaðið Sosialurin**. **Postadressa:** Postboks 76, 110 Tórshavn. **Telefon:** 311820. **Telefax:** 314720.
**Email til 2'aran:** eydun@sosialurin.fo. **Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller. **Blaðstjórn:** Eyðun Klakstein.
**Layout og uppseting:** Tíðindablaðið Sosialurin.



# Pegasus skiftir rás



**Hesi fólkini hava gjørt sendingar fyri Studio Pegasus, og framyvir verða hesar sendingar eftir øllum at døma at hoyra í Útvarpi Føroya.**
**Mynd: Jan Müller**

**ÚTVARP.** Studio Pegasus fer helst at senda fyri Útvarp Føroya longu sunnukvøldið. Talan er um somu sendingar, sum hava verið at hoyrt á Rás 2

*Dagfinn Olsen*

Nú er líkt til, at Studio Pegasus í Klaksvík fer at samstarva við Útvarp Føroya, eftir at tað ikki eydnaðist at fáa sáttmála í lag við Rás 2.

Útvarp Føroya er sinnað at royna eitt samstarv við Pegasus, og eftir tí, sum vit hava skilt, verður sent fyrstu ferð longu sunnukvøldið.

Pegasus hevur annars verið í samstarvi við Rás 2 seinastu vikurnar, men tað eydnaðist ikki pørtunum at semjast um ein sáttmála, sum samstarvið skuldi byggjast á, og tí fóru partarnir hvør til sítt áðrenn seinasta vikuskiftið. Rás 2 royndi seg tí við síni egnu skrá seinasta sunnukvøld, og talan var um onkra líknandi sending, sum Pegasus hevði gjørt.

Klaksvíkingar hava sent fýra sunnukvøld á Rás 2, og talan hevur sum heild verið um sendingar, sum hava fingið góð skoðsmál. Men tað hjálpti einki, tá Pegasus og Rás 2 ikki kundu semjast um ein sáttmála.

**Samdust ikki**

Stóri stríðsspurningurin var, hvussu tætt knýtt Pegasus og Rás 2 skuldu verða. Í sáttmálauppskotinum frá Rás 2 vildi útvarpsrásin hava Pegasus at binda seg til bert at gera útvarpstilfar fyri Rás 2.

Sáttmálin skuldi kunna sigast upp eftir einum mánaði, men eftir at samstarvið steðgaði, skuldi Pegasus ikki gera sendingar fyri nakran í eitt hálvt ár.

Hesar treytir vildi Pegasus ikki ganga undir, og tá Rás 2 samstundis hevði áhugað í at fáa sær sítt egna studio í Klaksvík, var eingin útvegur fyri einum framhaldandi samstarvi.

Rás 2 fer nú at senda úr sínum egna studio á Norðlýsinum, og líkt er til, at Rás 2 og Útvarp Føroya nú fara at vera í beinleiðis kapping sunnukvøldið. Hetta kvøld hevur annars verið útvarpsfrítt, men gjørdist eitt rættiligt útvarpskvøld við sendingunum hjá Rás 2.

**Byrja longu sunnukvøldið**

Eftir at samráðingarnar millum Pegasus og Rás 2 slitnaðu í síðstu viku, hevur samband verið millum Útvarp Føroya og Pegasus.

Partarnir hava tosað um eitt samstarv, og tað er líkt til, at hetta samstarv fer av bakkastokki longu sunnukvøldið. Útvarpsstjórin hevur váttað fyri Dimmalætting, at teir eru áhugaðir í at senda saman við Pegasus sunnukvøld, og eftir tí, sum vit hava skilt, skuldi fundur í gjár vera millum Pegasus og Útvarp Føroya um hetta samstarv.

Útvarp Føroya sigur seg hava arbeitt við møguleikanum at senda sunnukvøld, og at teir tí eru áhugaðir í sendingunum hjá Pegasus, sum teir halda hava røttu góðskuna.

Fyri Pegasus, sum hevur brúkt millum 50.000 og 100.000 krónur til at gera eitt útvarpsstudio, er besta loysnin, at studio kann fara í samstarv við Útvarp Føroya og harvið brúka ta útgerð, sum er keypt, og fáa nakrar inntøkur til hesar íløgur. Harafturat hava fólkini, sum hava gjørt sendingarnar fyri Pegasus, fingið royndir í útvarpsarbeiði, sum Pegasus æltar at gera sær dælt av.

**Royndu at forða fyri hesum**

Petur Jacobsen, stjóri á Rás 2, sigur við tíðindatænastuna hjá Leitel, at tað, sum sáttmálin strandaði upp á, var júst tað, sum nú er hent, og sum Rás 2 royndi at forða fyri.

Rás 2 royndi at útiloka møguleikan fyri, at Útvarp Føroya bara kundi koma inn í myndina og yvirtaka sendingarnar hjá Pegasus. Útvarpið hevur fleiri pengar at arbeiða við, og tí kann Rás 2 ikki kappast við teir á tí økinum.

Steintór Rasmussen, sum rekur Studio Pegasus, sigur, at einki samband var við Útvarpið fyrr enn tað varð greitt, at samstarvið við Rás 2 ikki fór at halda fram. Tá setti Pegasus seg í samband við útvarpsstjóran.

Síðani hevur tað gingið skjótt fyri seg, og fyrstu sendingarnar há Pegasus verða eftir øllum at døma at hoyra í Útvarpinum longu sunnukvøldið.

Vit hava skilt, at partnar ætla at gera eina fyribilsavtalu um samstarv, sum skal ganga fram til august mánaði. Hendan royndartíðin fer so at vísa, um samstarvið millum ÚF og Pegasus verður víðkað til eina veruliga deild í Klaksvík, ella um partarnir fara hvør til sítt í august mánaði.

Seinasta árið hevur ein útvarpssending verið gjørd í Studio Pegasus. Tað er Alpha Proxima, sum er at hoyra hvørt sunnukvøld í ÚF.

**Halda fast um skránna**

Rás 2 heldur fram at senda sunnukvøld, og teir hava til dømis hildið fast um at senda eina ítróttarsending kl. 21.00. Rás 2 hevur eisini víst áhuga fyri Popp-Topp listanum, sum verður sendur klokkan 20.00, men tað liggur fast, at hesin hitlisti við føroyskum tónleiki framyvir verður at hoyra í Útvarpinum.

Vit hava skilt, at Studio Pegasus ætlar at halda fast um sína skrá, og tað merkir helst, at bæði Útvarp Føroya og Rás 2 fara at hava eina ítróttarsending klokkan 21.00 sunnukvøld.

Umframt hesar sendingar hevur Pegasus eisini gjørt eina barna- og familjusending, eina øðrvísi undirhaldssending, eina ungdómssending og eina tíðindasending.

Norðoyastevna er um vikuskiftið, og tí verða fjølmiðlarnar helst væl umboðaðir í Klaksvík. Rás 2 fer at senda frá norðoyastevnuni, og Útvarp Føroya fer eisini at gera onkra sending í Klaksvík.

Men eisini eftir norðoyastevnuna er lagt upp til kapping millum útvarpsrásirnar í Klaksvík.